# Sildarok, fyrsta skipið siglir heim

bak-síðan

tíðinda sosialurin blaðið

7,-

Nr. 113 ★ fríggjadagur 17. juni 1994

**Skiparin á SHINKAI MARU:**

# Farið nú undir svart-kjafta-vinnu

síða 5

**– Vit hava prógvað, at tað ber til at virka 1. flokks surimi úr svartkjafti, sigur Shunji Suganuma, skipari**



# Fyrsta stigið til olju-vinnu

síða 3

**Fyrsta seismikkskipið er komið til Føroyar at arbeiða**




# Tey borgarligu vilja hava arbeiðsloysi

síða 17

# 9 tjóðir umborð

## *Westernskip á Havnina*



*Sea Star kemur á Havnina fyri fyrstu ferð*

Ikki færri enn 9 tjóðir eru umboðaðar, tá amerikanska kanningarskipið Sea Star kom á Havnina í gjár. Umframt føroying, danir, bretar og amerikanarar eru harumframt fólk úr Hálandi, Nicaraqua, Filipsoyggjunum, Columbia og Malta við skipinum.

Sea Star kom í føroyskan sjógv fyrr í vikuni og hava teir roynt nakað av útgerðini, men vána verður hevur tarnað teimum nakað. Aldurnar vóru nakað høgar, men ikki bagdi við vindinum frættist. Ætlanin varð at fara á Lopransfjørð at gera royndir longu leygardagin, men henda ætlan er broytt nakað, so skipið fer at byrja kanningarnar í ein landssynning úr Føroyum.

Skiparin á Sea Star, Garrett Dowcet sigur við Sosialin, at teir eru spentir at koma til Føroya at arbeiða, nú teir hava arbeitt kring allan knøttin. Teir koma júst úr Miðalhavinum. Umborð eru 44 mans. Skipið er sera væl útgjørt við teimum mest nútímans seismisku tólunum.

### Dáma væl at koma til Føroya

-Okkum dáma sera væl at koma til Føroya, vit hava hoyrt nógv um tykkara vøkru náttúru, so eg vóni bert, at vit fáa eitt gott samarbeiði ta tíðina vit fara at gera hesar spennandi kanningarnar fyri tykkum sigur Dowcet. Hann hevur verið við til nógvar stórar uppgávur úti í heimi, men metir hesa sum eina ta størstu avbjóðingina.

Vit hittu eisini leiðaran fyri seismisku kanningunum umborð. Hann er spentur at byrja kanningarnar. Upp á fyrispurning um teir meta tað verða torført at fáa nóg góðar upplýsingar, nú basaltløgini eru so tjúkk sigur hann, at teir hava tað allarbestu og mest nútímans útgerðina bæði umborð og á telduvirkjunum í landi, at tað verður eingin trupulleiki. -Vit skulu nokk syrgja fyri at fáa fyrsta floks úrslit og eina holla vitan um, hvussu tað sær út undir basaltinum, annars vóru vit ikki komnir til Føroya leggur hannn aftrat.

Hann sigur seg vera sera spentan um royndirnar í Lopra, tí hann hevur ikki roynt slíkt fyrr, nevniliga at hava móttøkutólini heilar 2000 metrar djúpt niðri í jørðini. -Tær kanningarnar eru ein stór avbjóðing fyri okkum, sum arbeiða við seismikki sigur seismiski leiðarin umborð á Sea Star við Sosialin.

jan

*Myndir Jan*



*Johan Mortensen, enskur konsul og nevndarlimur í Føroya Oljuídnaði var fyrstur at taka ímóti amerikanska skipinum*




*Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini og Súsanna Danielsen, fulltrúi í landsstýrinum í undirgrundarmálum vóru millum tey fyrstu á Havnarkei, tá Sea Star legði at*

